# Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 11

ISSN 0907-905X


Nr. 33

23. apríl 2010

**Kunngerð um broyting í kunngerð um yrkisgymnasiala undirvísing til hægri tøkniliga próvtøku (HT-kunngerðin)**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 69 frá 13. juni 2002 um yrkisgymnasiala undirvísing til hægri tøkniliga próvtøku, sum broytt við kunngerð nr. 5 frá 20. januar 2005, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4, stk. 1 verður aftaná 1. pkt. sett inn soljóðandi:
„Næmingarnir hava krav upp á í minsta lagi 90% av tímatalinum, sum ásett er í talvuni niðanfyri. Skúlastjórin skipar fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum næmingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum. Næmingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal.“

2) Í § 8, stk. 1 verður 2. pkt. strikað.

3) Í § 8, stk. 4 verður eftir seinasta pkt. sett inn soljóðandi:
„Skúlastjórin skipar fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum næmingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum, smbr. § 4, stk. 1. Næmingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal.“

4) § 8, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Um fráveran í einari lærugrein fer upp um 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinunum, fær næmingurin fyrru ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin skrivliga ella í talgildari fráboðan hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina.“

5) § 8, stk. 6 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Um næmingurin við eini seinni uppgerð ikki hevur tikið ávaringina sbrt. stk. 5 til eftirtektar, fær næmingurin seinnu ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin skrivliga ella í talgildari fráboðan hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina. Næmingurin fær bert tvær ávaringar. Um næmingurin við eftirfylgjandi fráveruuppgerð framhaldandi ikki hevur tikið ávaringarnar til eftirtektar, soleiðis at fráveran framvegis er meiri enn 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinum, kann næmingurin ikki halda fram í útbúgvingini. Hann kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

6) Í § 8 verður stk. 7 strikað, og stk. 8 og stk. 9 verða eftir hetta til stk. 7 og stk. 8.

7) § 9 verður orðað soleiðis:
„**§ 9.** Næmingarnir skulu fylgja skilhaldsreglum skúlans. Skúlastjórin sær til, at næmingarnir við skúlaársbyrjan verða kunnaðir um reglurnar og um avleiðingarnar, um reglurnar ikki verða fylgdar.
*Stk. 2.* Skúlastjórin kann burturvísa næmingi úr skúlanum, um næmingur groft brýtur skilhaldsreglur skúlans. Næmingur, sum verður burturvístur, kann fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

8) Í § 15, stk. 4, verður síðsta pkt. strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð fær gildi 1. august 2010. Tó fáa § 1, nr. 1 virkna frá 1. august 2009.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/Leivur Harryson (sign.)

## Kunngerð um broyting í kunngerð um støðisútbúgving innan fyrisitingar-, handils- og skrivstovuøkið (FHS-kunngerðin)

### § 1

Í kunngerð nr. 15 frá 14. februar 2000 um støðisútbúgving innan fyristingar-, handils- og skrivstovuøkið, sum seinast broytt við kunngerð nr. 75 frá 8. august 2002, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 4, stk 3, verður „samanhangandi grund-"broytt til „D-", og síðsta punktum verður strikað.

2) Í § 4, stk. 4, verður í ovasta teigi í talvuni „Grundstigi" broytt til „D-stigi".

3) Í § 8, stk. 1, nr. 3 verður „Kunningartøkni á C-stigi" broytt til „KST C, bert sjálvstøðug lærugrein hjá sjálvlesandi og stakgreinalesandi".

4) § 12, stk. 4 verður strikað.

5) Í § 15, stk. 1 verður „eisini um hann skal til próvtøku eftir serligum treytum, sbrt. §16, stk. 4. strikað, og punktum verður sett eftir skrivligt avrik."

6) § 15, stk 4 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 4.* Um fráveran í einari lærugrein fer upp um 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinunum, fær næmingurin fyrru ávaring. Fyrsta fráveruuppgerðin fer fram beint undan heystfrítíðini. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina."

7) § 15, stk. 5, 6 og 7 verða strikað og í staðin verður sett inn:
„Stk. 5. Um næmingurin við eini seinni uppgerð ikki hevur tikið ávaringina sbrt. stk. 4 til eftirtektar, fær næmingurin seinnu ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina. Næmingurin fær bert tvær ávaringar. Um næmingurin við eftirfylgjandi fráveruuppgerð framhaldandi ikki hevur tikið ávaringarnar til eftirtektar, so fráveran framvegis er meiri enn 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella meiri enn 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinum, kann næmingurin ikki halda fram í útbúgvingini. Hann kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.
*Stk. 6.* Stakgreinalesandi eru eisini fevnd av ásetingunum um møtiskyldu.
*Stk. 7.* Skúlastjórin sær til, at næmingarnir í teimum einstøku flokkunum/bólkunum fáa í minsta lagi 90% av tí í § 4, stk. 4 ásetta tímatalinum. Skúlastjórin skipar fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum næmingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum. Næmingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal.
*Stk. 8.* Skúlastjórin kann í heilt serligum føri loyva næmingi, ið hevur verið fyri álvarsligum lívstilburði, at fara til próvtøku eftir vanligum treytum, hóast ásetingarnar í stk. 4 og stk. 5. Mentamálaráðið skal hava fráboðan."

8) Aftaná § 15 verður sett:
"**§ 15 a.** Næmingarnir skulu fylgja skilhaldsreglum skúlans. Skúlastjórin sær til, at næmingarnir við skúlaársbyrjan verða kunnaðir um reglurnar og um avleiðingarnar, um reglurnar ikki verða fylgdar.
*Stk. 2.* Skúlastjórin kann burturvísa næmingí úr skúlanum, um næmingur groft brýtur skilhaldsreglur skúlans. Næmingur, sum verður burturvístur, kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum."

9) § 16, stk. 4 verður strikað, og í stk. 5, sum hereftir verður stk. 4, verður síðsta punktum strikað."

10) § 17, stk. 2 og stk. 3 verður strikað, og í stk. 4, sum hereftir verður stk. 2, verður síðsta punktum strikað.

### § 2

Henda kunngerð fær gildi frá 1. august 2010. Tó fær § 1, nr. 1, 2, 3 og 4 virkna frá 1. august 2009.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/Leivur Harryson (sign.)

# Kunngerð um broyting í kunngerð um studentaskúlar og stakgreinalestur á studentaskúlastigi (Studentaskúlakunngerðin)

## § 1

Í kunngerð nr.102 frá 26. juni 2001 um studentaskúlar og stakgreinalestur á studentaskúlastigi, sum seinast broytt við kunngerð nr. 99 frá 22. august 2005, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 5, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Rektarin sær til, at næmingarnir í teimum einstøku lærugreinunum fáa í minsta lagi 90% av tí í stk. 1 ásetta pultstímatalinum. Rektarin skipar fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum næmingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum. Næmingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal.“

2) Í § 13, stk. 1, verður 1. pkt. orðað soleiðis: „Næmingar hava skyldu at fylgja undirvísingini, herímillum rættstundis at lata inn øll kravd skrivlig avrik, at fara til ársroynd eftir 1. og 2. studentaskúlaflokk og at fara til várroynd í 1., 2. og 3. studentaskúlaflokki.“

3) § 13, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Um fráveran í einari lærugrein fer upp um 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinunum, fær næmingurin fyrru ávaring. Fyrsta fráveruuppgerðin fer fram beint undan heystfrítíðini. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin skrivliga ella í talgildari fráboðan hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina.“

4) §13, stk. 6 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Um næmingurin við eini seinni uppgerð ikki hevur tikið ávaringina sbrt. stk. 5 til eftirtektar, fær næmingurin seinnu ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin skrivliga ella í talgildari fráboðan hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina. Næmingurin fær bert tvær ávaringar. Um næmingurin við eftirfylgjandi fráveruuppgerð framhaldandi ikki hevur tikið ávaringarnar til eftirtektar, soleiðis at fráveran framvegis er meiri enn 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinum, verður næmingurin burturvístur frá útbúgvingini. Hann kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

5) Í § 13 verður stk. 7 strikað.

6) § 14, stk. 2 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 2.* Rektarin kann burturvísa næmingi úr skúlanum, um næmingur groft brýtur skilhaldsreglur skúlans. Næmingur, sum verður burturvístur, kann fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

7) § 16 verður strikað.

8) Í § 23, stk. 1 verður „ , sbr. tó § 13, stk. 7“ strikað.

9) Í Fylgiskjali 1, Juli 1996, Alisfrøði, verður í punkt 4.3 „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

10) Í Fylgiskjali 1, Juli 1996, Alisfrøði, verður í punkt 10.3 „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

11) Í Fylgiskjali 1, Juli 1996, Alisfrøði, verður punkt 12.1 orðað soleiðis:
„Skrivliga próvtøkan varir 5 tímar, og høvuðsevnini bæði á felagslærugreinastigi og hástigi verða givin upp. Serevnini eru tó undantikin.“

12) Í Fylgiskjali 1, Juli 1996, Alisfrøði, verður í punkt 17.3 „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum reglum,“ strikað.

13) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður pkt. 3.5 orðað soleiðis:
„**3.5.** Skrivliga arbeiðið fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum/bólkinum. Skrivliga arbeiðið fevnir um til samans **30 uppgávur á 2-4 síður**. 2 smærri uppgávur telja sum ein vanlig uppgáva. Lærarin ger viðmerkingar til innlatnu uppgávurnar, bæði í flokkinum/bólkinum og einsæris.“

14) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður í punkt 5.3 „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum reglum“ strikað.

15) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 7.1 orðað soleiðis:
„**7.1.** Skrivliga próvtøkan er býtt í tveir partar og varir **5 tímar**. Alt uppgávusettið verður býtt út við próvtøkubyrjan. Fyrri parturin, ið varir ein tíma, fer fram uttan nýtslu av teldu ella øðrum hjálparmiðlum. Tá ið 1 tími er farin, verður fyrri parturin av uppgávusettinum savnað inn. Í seinna partinum kunnu allir hjálparmiðlar verða nýttir.“

16) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 7.2 strikað.

17) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 8.1 orðað soleiðis:
„**8.1.** Í dømingini verður dentur lagdur á, hvussu væl próvtakarin hevur skilt tilfarið, sum hann viðger, og hvussu hann megnar at orða seg væl og fjølbroytt á enskum innan karmarnar í enska málbygnaðinum. Próvtakarin skal vera nøkulunda stinnur í idiomatikki, semantikki, syntaksi, morfologi og ortografi.“

18) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 11.5 orðað soleiðis:
„**11.5.** Skrivliga arbeiðið fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum/bólkinum. Skrivliga arbeiðið fevnir um til samans **15 uppgávur á 4-5 síður**. 2 smærri uppgávur telja sum ein vanlig uppgáva. Lærarin ger viðmerkingar til innlatnu uppgávurnar, bæði í flokkinum/bólkinum og einsæris.“

19) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður í punkt 14.3 orðingin “fylgt undirvísingini ella” strikað.

20) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður í punkt 14.4, 1. pkt. „og næmingur, ið fer til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað, og í 2. pkt. „ella næmingurin, ið fer til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

21) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 16.1 orðað soleiðis:
„**16.1.** Skrivliga próvtøkan er býtt í tveir partar og varir **5 tímar**. Alt uppgávusettið verður býtt út við próvtøkubyrjan. Fyrri parturin, ið varir ein tíma, fer fram uttan nýtslu av teldu ella øðrum hjálparmiðlum. Tá ið 1 tími er farin, verður fyrri parturin av uppgávusettinum savnað inn. Í seinna partinum kunnu allir hjálparmiðlar verða nýttir.“

22) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 17.1 orðað soleiðis:
„**17.1.** Í dømingini verður dentur lagdur á, hvussu væl próvtakarin hevur skilt tilfarið, sum hann viðger, og hvussu hann megnar at orða seg fjølbroytt, flótandi og fimt á røttum enskum máli. Próvtakarin skal vera stinnur í idiomatikki, semantikki, syntaksi, morfologi og ortografi.“

23) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður í punkt 21.3 „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

24) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 25.5 orðað soleiðis:
„**25.5.** Skrivliga arbeiðið fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum/bólkinum. Skrivliga arbeiðið fevnir um til samans **15 uppgávur á 4-5 síður**. 2 smærri uppgávur telja sum ein vanlig uppgáva. Lærarin ger viðmerkingar til innlatnu uppgávurnar, bæði í flokkinum/bólkinum og einsæris.“

25) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður í punkt 28.4, 1. pkt. „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað, og í 2. pkt. „ella næmingurin, ið fer til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

26) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 30.1 orðað soleiðis:
„**30.1.** Skrivliga próvtøkan er býtt í tveir partar og varir **5 tímar**. Alt uppgávusettið verður býtt út við próvtøkubyrjan. Fyrri parturin, ið varir ein tíma, fer fram uttan nýtslu av teldu ella øðrum hjálparmiðlum. Tá ið 1 tími er farin, verður fyrri parturin av uppgávusettinum savnað inn. Í seinni partinum mugu allir hjálparmiðlar verða nýttir.“

27) Í Fylgiskjali 5, Juli 1996, Enskt, verður punkt 31.1 orðað soleiðis:
„**31.1.** Í dømingini verður dentur lagdur á, hvussu væl próvtakarin hevur skilt tilfarið, sum hann viðger, og hvussu hann megnar at orða seg fjølbroytt, flótandi og fimt á røttum enskum máli. Próvtakarin skal vera stinnur í idiomatikki, semantikki, syntaksi, morfologi og ortografi.“

28) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður í punkt 4.3 „og næmingum, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

29) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður í punkt 9.3 „og næmingum, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

30) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður punkt 13.1, 4) orðað soleiðis:
„*4) Spektroskopi*
Spektroskopisk eyðmerking við hjálp av IR og $^{1}$H-NMR.“

31) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður í punkt 15.3 „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum" strikað.

32) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður punkt 17.1 orðað soleiðis:
„**17.1.** Skrivliga próvtøkan varir 5 tímar. Próvtakararnir fáa eitt uppgávusett innan høvuðstættirnar, sum kravt stig og hástig fevna um."

33) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður punkt 17.2 orðað soleiðis:
„**17.2.** Allir hjálparmiðlar eru loyvdir."

34) Í Fylgiskjali 6, Juli 1996, Evnafrøði, verður í punkt 22.3 „og næmingum, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum," strikað.

35) Í Fylgiskjali 13, Juli 1996, Geografi, verður punkt 3.3 orðað soleiðis:
„**3.3.** Lesipensum fevnir um 230 – 250 síður, og próvtøkupensum fevnir um 160 – 180 síður, og skal próvtøkupensum umboða øll viðgjørd evni."

36) Í Fylgiskjali 13, Juli 1996, Geografi, verður í punkt 4.3 „og næmingum, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum" strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð fær gildi 1. august 2010. Tó fær § 1 pkt. 9, 10, 11, 12, 13, 14, 15, 16, 17, 18, 19, 20, 21, 22, 23, 24, 25, 26, 27, 28, 29, 30, 31, 32, 33, 34 og 36 virkna frá 1. august 2009.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson, (sign.)

**Kunngerð um broyting í kunngerð um støðisútbúgving og hægri próvtøku innan fiskivinnu**

§ 1

Í kunngerð nr. 59 frá 16. apríl 2003 um støðisútbúgving og hægri próvtøku innan fiskivinnu verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1, stk. 3 verður „yrkisgymnasial útbúgving“ broyt til „yrkisgymnasial HT-útbúgving“.

2) § 1, stk. 4 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 4.* Útbúgvingin endar við próvtøku, og næmingurin fær útskrivað eitt HT-prógv við undirheitinum “Fiskivinnubreyt/framleiðsla“.

3) Í § 5, stk. 2 verður í talvuni **Tímatal og stig 2.HIF** „Fyriskipan 140 (A)“ strikað.

4) Í § 5, stk. 2 verður í talvuni **Tímatal og stig 1.HIF** „Smáverulívfrøði 140 (B)“ strikað.

5) Í § 5, stk. 2 verður í talvuni **Tímatal og stig 2.HIF** undir **Alibreyt** „Alilívfrøði 175 (A)“ og í talvuni **Tímatal og stig 2.HIF** undir **Fiskivirkisbreyt** „Matvørulæra 175 (A)“ strikað.

6) Í § 5, stk. 2 verður í talvuni **Tímatal og stig 1. HIF** undir *Felags hjá báðum breytunum* sett „Lívfrøði A (175)“ og í talvuni **Tímatal og stig 2. HIF** undir *Felags hjá báðum breytunum* sett „Lívfrøði A (175)“.

7) Í § 5 verður aftaná stk. 7 innsett nýtt stk. 8:
„Stk. 8. Skúlastjórin sær til, at næmingarnir í teimum einstøku flokkunum/bólkunum fáa í minsta lagi 90% av tí í § 5, stk. 2 ásetta tímatalinum. Skúlastjórin ger reglur fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum næmingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum. Næmingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal.“

8) § 6, stk. 4 verður strikað, og stk. 5-7 verður eftir hetta stk. 4-6.

9) § 9, stk. 1, 3. pkt. verður orðað soleiðis:
„Tó fáa stakgreinalesandi og sjálvlesandi ikki ársmet.“

10) Í § 11, stk. 1 verður 2. pkt. strikað.

11) Í § 11, stk. 3 verður „Rektarin“ broytt til „Skúlastjórin“.

12) Í § 11, stk. 4 verður „Rektarin“ broytt til „Skúlastjórin“.

13) § 11, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Um fráveran í einari lærugrein fer upp um 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinunum, fær næmingurin fyrru ávaring. Fyrsta fráveruuppgerðin fer fram beint undan heystfrítíðini. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina.“

14) §11, stk. 6 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Um næmingurin við eini seinni uppgerð ikki hevur tikið ávaringina sbrt. stk. 5 til eftirtektar, fær næmingurin seinnu ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina. Næmingurin fær bert tvær ávaringar. Um næmingurin við eftirfylgjandi fráveruuppgerð framhaldandi ikki hevur tikið ávaringarnar til eftirtektar, so fráveran framvegis er meiri enn 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella meiri enn 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinum, kann næmingurin ikki halda fram í útbúgvingini. Hann kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

15) Í § 11 verður stk. 7 strikað, og stk. 8 og stk. 9 verða eftir hesum til stk. 7 og stk. 8.

16) Í § 11, stk. 9 verður „Rektarin“ broytt til „Skúlastjórin“.

17) Aftaná § 11 verður sett:
„**§ 11 a.** Næmingarnir skulu fylgja skilhaldsreglum skúlans. Skúlastjórin sær til, at næmingarnir við skúlaársbyrjan verða kunnaðir um reglurnar og um avleiðingarnar, um reglurnar ikki verða fylgdar.

*Stk. 2.* Skúlastjórin kann burturvísa næmingi úr skúlanum, um næmingur groft brýtur skilhaldsreglur skúlans. Næmingur, sum verður burturvístur, kann fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum."

18) Í § 12 verður stk. 4 strikað, og stk. 5 verður eftir hesum til stk. 4.

19) Í § 16, stk. 3 verða í talvuni **Lærugrein, 1. árið** „Smáverulívfrøði B" og í talvuni **Próvtøkuháttur** „M" strikað.

20) Í § 16, stk. 3 verða í talvuni **Lærugrein, 2. árið** „Alilívfrøði A (vallærugrein)" og í talvuni **Próvtøkuháttur** „*S,M" strikað.

21) Í § 16, stk. 3 verða í talvuni **Lærugrein, 2. árið** „Fyriskipan A)" og í talvuni **Próvtøkuháttur** „*S" strikað.

22) Í § 16, stk. 3 verða í talvuni **Lærugrein, 2. árið** „Matvørulæra A (vallærugrein)" og í talvuni **Próvtøkuháttur** „*S, M" strikað.

23) Í § 16, stk. 3 verður í talvuni **Lærugrein, 2. árið** „Lívfrøði A" sett inn og í talvuni **Próvtøkuháttur** „*S, M" sett inn.

**§ 2**

Henda kunngerð fær gildi frá 1. august 2010, tó fáa § 1, nr. 1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 11, 12, 16, 17, 19, 20, 21, 22 og 23 gildi frá 1. august 2009.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/Leivur Harryson (sign.)

# Kunngerð um broyting í kunngerð um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku og um lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing (HF-kunngerðin)

## § 1

Í kunngerð nr.103 frá 17. juli 1996 um skeið til hægri fyrireikingarpróvtøku og um lestrarfyrireikandi stakgreinaundirvísing, sum seinast broytt við kunngerð nr. 4 frá 20. januar 2005, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 6 verður sum stk. 8 sett:
„*Stk. 8.* Rektarin sær til, at næmingarnir í teimum einstøku flokkunum/bólkunum fáa í minsta lagi 90% av tí í § 2, stk. 1 ásetta tímatalinum. Rektarin skipar fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum næmingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum. Næmingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal.“

2) § 17, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

3) § 17, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Um fráveran í einari lærugrein fer upp um 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinunum, fær næmingurin fyrru ávaring. Fyrsta fráveruuppgerðin fer fram beint undan heystfrítíðini. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin skrivliga ella í talgildari fráboðan hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina.“

4) § 17, stk. 6 verður orðað soleiðis:
„Stk. 6. Um næmingurin við eini seinni uppgerð ikki hevur tikið ávaringina sbrt. stk. 5 til eftirtektar, fær næmingurin seinnu ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at næmingurin hevur fingið ávaringina. Um næmingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina. Næmingurin fær bert tvær ávaringar. Um næmingurin við eftirfylgjandi fráveruuppgerð framhaldandi ikki hevur tikið ávaringarnar til eftirtektar, so fráveran framvegis er meiri enn 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella meiri enn 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinum, verður næmingurin burturvístur frá útbúgvingini. Hann kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

5) Í § 17 verður stk. 7 strikað, og stk. 8 og stk. 9 verða eftir hetta stk. 7 og stk. 8.

6) Aftaná § 17 verður sett:
„**§ 17 a.** Næmingarnir skulu fylgja skilhaldsreglum skúlans. Rektarin sær til, at næmingarnir við skúlaársbyrjan verða kunnaðir um reglurnar og um avleiðingarnar, um reglurnar ikki verða fylgdar.
*Stk. 2.* Rektarin kann burturvísa næmingi úr skúlanum, um næmingur groft brýtur skilhaldsreglur skúlans. Næmingur, sum verður burturvístur, kann fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum.“

7) Í § 19, stk. 1 verður „umframt næmingum, ið sambært § 17, stk. 7, eru burturvístir frá undirvísingini,“ strikað.

8) Í § 19, stk. 2 verður „og § 17, stk. 7“ strikað.

9) § 19, stk. 3, 4. pkt. verður strikað.

10) Í Fylgiskjali 4, Mai 2002, Enskt, verður punkt 3.5 orðað soleiðis:
„**3.5.** Skrivliga arbeiðið fer fram lutvíst heima og lutvíst í flokkinum/bólkinum. Skrivliga arbeiðið fevnir um til samans **30 uppgávur á 2-4 síður**. 2 smærri uppgávur telja sum ein vanlig uppgáva. Lærarin ger viðmerkingar til innlatnu uppgávurnar, bæði í flokkinum/bólkinum og einsæris.“

11) Í Fylgiskjali 4, Mai 2002, Enskt, verður í punkt. 6.3 „og næmingar, sum fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

12) Í Fylgiskjali 4, Mai 2002, Enskt, verður punkt 8.1 orðað soleiðis:
„**8.1.** Skrivliga próvtøkan er býtt í tveir partar og varir **5 tímar**. Alt uppgávusettið verður býtt út við próvtøkubyrjan. Fyrri parturin, ið varir ein tíma, fer fram uttan nýtslu av teldu ella øðrum hjálparmiðlum. Tá ið 1 tími er farin, verður fyrri parturin av uppgávusettinum savnað inn. Í seinna partinum kunnu allir hjálparmiðlar verða nýttir.“

13) Í Fylgiskjali 4, Mai 2002, Enskt, verður punkt 9.1 orðað soleiðis:
„**9.1.** Í dømingini verður dentur lagdur á, hvussu væl próvtakarin hevur skilt tilfarið, sum hann viðger, og hvussu hann megnar at orða seg væl og fjølbroytt á enskum innan karmarnar í enska málbygnaðinum. Próvtakarin skal vera nøkulunda stinnur í idiomatikki, semantikki, syntaksi, morfologi og ortografi.“

14) Í Fylgiskjali 12, Juli 1996, Geografi, verður punkt 3.3 orðað soleiðis:
„**3.3.** Lesipensum fevnir um 230 – 250 síður, og próvtøkupensum fevnir um 160 – 180 síður, og skal próvtøkupensum umboða øll viðgjørd evni.“

15) Í Fylgiskjali 12, Juli 1996, Geografi, verður í punkt 4.3 „og næmingum, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum“ strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/Leivur Harryson (sign.)

**Kunngerð um broyting í kunngerð um handilsgymnasiala undirvísing til hægri handilspróvtøku (HH-kunngerðin)**

§ 1

Í kunngerð nr.105 frá 30. august 2000 um handilsgymnasiala undirvísing til hægri handilspróvtøku, sum broytt við kunngerð nr. 100 frá 22. august 2005, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 5, stk 2 verður eftir síðsta punktum sett inn nýtt punktum, ið verður orðað soleiðis:
„Nemingarnir hava krav upp á í minsta lagi 90% av ásetta tímatalinum."

2) Í § 5, stk. 2 verður í talvuni **Lærugrein**, **Tímatal og stig 2. HH,** *vallærugrein* „Ársroknskapur 175 (A), Fyriskipan 140 (A), KT 140 (A)" strikað.

3) Í § 5, stk. 2 verður í talvuni **Lærugrein**, **Tímatal og stig 1 árs HH-útb.** *vallærugrein* „Ársroknskapur 175 (A), Fyriskipan 140 (A), KT 140 (A)" strikað.

4) Í § 6 verður stk. 6 strikað, og stk. 7 verður eftir hetta stk. 6.

5) Í § 16, stk. 1 verður 2. pkt. orðað soleiðis:
„Høvuðsuppgávan verður skrivað í vallærugrein á A-stigi, men onnur lærugrein á A- ella B-stigi kann nýtast sum stuðulslærugrein í hesum sambandi."

6) Í § 17, stk. 1 verður „Henda ásetingin er eisini galdandi fyri nemingar, sum skulu til próvtøku eftir serligum treytum." strikað.

7) § 17, stk. 5 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 5.* Um fráveran í einari lærugrein fer upp um 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella upp um 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinunum, fær nemingurin fyrru ávaring. Fyrsta fráveruuppgerðin fer fram beint undan heystfrítíðini. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at nemingurin hevur fingið ávaringina. Um nemingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina."

8) §17, stk. 6 orðað soleiðis:
„*Stk. 6.* Um nemingurin við eini seinni uppgerð ikki hevur tikið ávaringina sbrt. stk. 5 til eftirtektar, fær nemingurin seinnu ávaring. Skúlin ger skipan fyri, hvussu skjalprógvast kann, at nemingurin hevur fingið ávaringina. Um nemingurin er undir 18 ár, fær foreldramyndugleikin skrivliga ella talgilda fráboðan um ávaringina. Nemingurin fær bert tvær ávaringar. Um nemingurin við eftirfylgjandi fráveruuppgerð framhaldandi ikki hevur tikið ávaringarnar til eftirtektar, so fráveran framvegis er meiri enn 15% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) ella av kravdum skrivligum avrikum í einari lærugrein, ella meiri enn 10% av ásetta pultstímatalinum (tímum, sum eiga at vera lisnir fram til hvønn uppgerðardag) til samans í øllum lærugreinum, kann nemingurin ikki halda fram í útbúgvingini. . Hann kann tó fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum."

9) Í § 17 verður stk. 7 strikað, og stk. 9 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 9.* Skúlastjórin sær til, at nemingarnir í teimum einstøku flokkunum/bólkunum fáa í minsta lagi 90% av tí í § 5, stk. 2 ásetta tímatalinum. Skúlastjórin skipar fyri, hvussu skráseting av teimum ásettu pultstímunum, sum nemingarnir hava krav uppá, verður framd í skúlanum. Nemingarnir skulu hava atgongd til at síggja yvirlit yvir hildnar tímar í mun til ásetta kravið um pultstímatal."

10) Í § 17 verður stk. 8 og stk. 9 eftir hetta stk. 7 og stk. 8.

11) Aftaná § 17 verður sett:
„**§ 17 a.** Nemingarnir skulu fylgja skilhaldsreglum skúlans. Skúlastjórin sær til, at nemingarnir við skúlaársbyrjan verða kunnaðir um reglurnar og um avleiðingarnar, um reglurnar ikki verða fylgdar.
*Stk. 2.* Skúlastjórin kann burturvísa nemingi úr skúlanum, um nemingur groft brýtur skilhaldsreglur skúlans. Nemingur, sum verður burturvístur, kann fara til próvtøku sum sjálvlesandi sambært galdandi reglum."

12) Í § 18, stk. 5, verður „til munnliga próvtøku í lærugreinini KT á A-stigi," strikað.

13) Í § 18, stk. 1 verður í teiginum „Próvtøkuháttur" út fyri Støddfrøði C „S" strikað og inn verður sett „S,M".

14) § 19 verður strikað.

15) Í § 21, stk. 2 verður síðsta punktum strikað.

16) § 21, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Fyri sjálvlesandi er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum. Sjálvlesandi skulu skriva høvuðsuppgávu, áðrenn tey skriva seg inn til síðstu próvtøkuna til eina samlaða HH-próvtøku. Høvuðsuppgávan verður skrivað í vallærugrein á A-stigi, men onnur lærugrein á A- ella B-stigi kann nýtast sum stuðulslærugrein í hesum sambandi, smbr. § 16, stk. 1.“

17) Í § 21, stk. 4 verður „og næmingum, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

18) Í § 21, stk. 6, verður „og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum,“ strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó fáa § 1, nr. 2, nr. 3, nr. 5, nr. 8, nr. 12, nr. 13 og nr. 16 gildi 1. august 2010.

Mentamálaráðið, 23. apríl 2010

**Helena Dam á Neystabø (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Leivur Harryson (sign.)

Nr. 39 23. apríl 2010

# Kunngerð um tænastugjald í samband við tolling og umtolling

Við heimild í § 16, stk. 5 og § 23, stk. 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum seinast broytt við løgtinglóg nr. 59 frá 25. mai 2009, verður ásett:

**§ 1.** Fyri sendingar, sum koma til tolløkið, skal tænastugjald á kr. 30,00 rindast til TAKS fyri skráseting í post- og innflutningsskipanini. Fyri sendingar, sum eru avgjaldsfríar, skal tó einki tænastugjald rindast.

**§ 2.** Fyri umtolling skal rindast eitt tænastugjald á kr. 200,00.

**§ 3.** Tænastugjøldini í § 1 og § 2 fella til TAKS.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 7 frá 2. februar 2007 um tænastugjald í samband við tolling og umtolling.

Fíggjarmálaráðið, 23. apríl 2010

**Jóannes Eidesgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge (sign.)

**Kunngerð**
**um**
**fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum**

Við heimild í § 9, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum, verður ásett:

*Loyvi og leiðir*

**§ 1.** Eftir umsókn verður loyvt í mesta lagi fýra skipum at reka beinleiðis veiði eftir havtasku (*Lophius piscatorius*) og svartkalva (*Reinhardtius hippoglossoides*) við gørnum á niðan fyri standandi leiðum. Eisini er loyvt trimum skipum eftir umsókn at reka beinleiðis veiði eftir svartkalva við gørnum, og einum skipi at reka beinleiðis veiði eftir havtasku við gørnum í einum fiskiári.

*Stk. 2.* Loyvt er at veiða havtasku á hesum leiðum, sbr. tó stk. 4:

1) Alt árið á leiðum vestan fyri eina linju drigna millum hesi støð:
64°47’00” N, 07°45’00” V
62°38’00” N, 07°45’00” V
62°28’00” N, 08°20’00” V
62°24’00” N, 08°40’00” V
62°17’00” N, 08°53’00” V
62°10’00” N, 09°00’00” V
61°47’00” N, 08°34’00” V
61°38’00” N, 08°14’00” V
61°30’00” N, 08°12’00” V
61°27’00” N, 08°05’00” V
61°26’00” N, 07°45’00” V
60°30’00” N, 07°00’00” V
59°57’00” N, 06°00’00” V
2) Alt árið innan fyri linjur drignar millum hesi støð:
62°00’00”N, 05°50’00”V
62°00’00”N, 05°30’00”V
61°45’00”N, 05°50’00”V
61°38’00”N, 05°40’00”V
61°38’00”N, 06°00’00”V
62°00’00”N, 05°50’00”V

*Stk.3.* Loyvt er at veiða svartkalva, har dýpið er meira enn 500 m, sbr. tó stk. 4.

*Stk.4.* Hjá fiskiførum við loyvi sambært stk. 1 er fiskiskapur við gørnum ikki loyvdur á niðan fyri standandi leiðum:

1) Á Íslandsrygginum innan fyri linjur drignar millum hesi støð:
63°45’00”N, 10°00’00”V
63°27’18”N, 10°02’00”V
63°08’09”N, 11°11’36”V
63°00’00”N, 11°24’40”V
62°48’00”N, 09°40’00”V
63°45’00”N, 10°00’00”V
2) Á Føroya Banka innan fyri linjur drignar millum hesi støð:
60°50’00”N, 07°57’00”V
61°03’00”N, 07°57’00”V
61°15’30”N, 08°16’00”V
61°13’20”N, 08°42’12”V
61°00’00”N, 09°11’00”V
60°48’40”N, 09°25’00”V
60°24’00”N, 09°07’00”V
60°50’00”N, 07°57’00”V
3) Á Ytra Banka, har tað er grynri enn 380 m. Tó er fiskiskapur eftir havtasku loyvdur á tí parti av Ytra banka, sum er vestan fyri 10°11’ V og sunnan fyri 60°38’ N.

**§ 2.** Eftir umsókn verður loyvt einum fiskifari undir 80 tons at reka beinleiðis veiði eftir havtasku við gørnum frá 1. februar til 31. oktober, báðir dagar íroknaðir, á eini leið millum 06°33’38”V og 07°12’30”V frá 12 fjórðingum úr grundlinjunum og út á eina linju drigna millum 62°55’00”N, 07°12’30”V og 02°55’00”N, 06°33’38”V.

*Hjáveiða*

**§ 3.** Hjá fiskifari við loyvi sambært § 1, stk. 1 kann hjáveiða av toski, hýsu, upsa og kongafiski í mesta lagi vera 20% av vektini av veiðinøgdini tilsamans roknað fyri árið. Hendan avmarkingin í hjáveiðu er tó ikki galdandi fyri fiskiskap við gørnum á leiðum norðan fyri 62°39’N og vestan fyri 8°V.

*Stk. 2.* Hjá fiskifari við loyvi sambært § 2, kann hjáveiða av toski, hýsu, upsa og kongafiski í mesta lagi vera 7% av vektini av veiðinøgdini tilsamans roknað fyri árið. Tó kann hjáveiðan av nevndu fiskasløgum einstakar túrar vera upp til 15% av vektini av veiðinøgdini tilsamans fyri túrin.

*Reiðskapur*

**§ 4.** Fyri fiskifør við loyvi sambært § 1, stk. 1 galda hesar treytir fyri reiðskapin:

1) Tað er ikki loyvt at seta ella hava standandi fleiri enn 1400 gørn í sjónum, sum eru 27,5 m til longdar, ella um onnur garnalongd verður nýtt, so má tað samlaða garnastrekkið ikki fara upp um samsvarandi longd.
2) Einki skip má nýta havtaskugørn, har meskarnir í nøkrum parti av garninum fara niður um 280 mm, og
3) einki skip má nýta svartkalvagørn, har meskarnir í nøkrum parti av garninum fara niður um 200 mm.

*Stk. 2.* Fyri fiskifør við loyvi sambært § 2 galda hesar treytir fyri reiðskapin:

Tað er ikki loyvt at seta ella hava standandi fleiri enn 900 gørn í sjónum, sum eru 27,5 m til longdar ella,

um onnur garnalongd verður nýtt, so má tað samlaða garnastrekkið ikki fara upp um samsvarandi longd. Loyvt er ikki at nýta havtaskugørn, har meskarnir í nøkrum parti av garninum fara niður um 300 mm.
*Stk. 3.* Meskavíddin skal vera soleiðis, at tá ið meskin verður strektur á vátum neti diagonalt eftir longdini, skal flatt mátitól 2 mm tjúkt við tí ásetta mátinum lættliga ganga ígjøgnum meskarnar í netinum, sbr. kunngerð nr. 24 frá 13. apríl 1989 um starvsreglugerð fyri vaktartænastuna á landleiðini viðvíkjandi meskamáting, sum broytt við kunngerð nr. 149 frá 14. juli 1993.
*Stk. 4.* Endaboyur skulu vera merktar við skipanummari við skilligum stavum og tølum. Harumframt skal hvør trossi vera merktur við nummari, sum skal førast í dagbókina við tilskilan um, nær sett er.

*Aðrar ásetingar*

**§ 5.** Treyt fyri at reka fiskiskap eftir hesi kunngerð er, at fiskifarið hevur fiskiloyvi til hesa veiði, og at fiskifarið fylgir teimum reglum, ið galda fyri veiði eftir botnfiski á landleiðunum.

**§ 6.** Tað er ikki loyvt at vera á svartkalvaveiði og havtaskuveiði sama túr. Loyvt er at leggja um frá svartkalvaveiði til havtaskuveiði ella øvugt innan fyri tvær vikur tvær ferðir um árið. Øll skip við loyvi sambært § 1, stk. 1 skulu boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, tá tey leggja um, og tá tey byrja, eins og tey skulu boða frá 12 tímar áðrenn tey gevast við fiskiskapinum.

**§ 7**. Fiskifør við loyvi sambært hesi kunngerð skulu, beinanvegin sett er fyrstu ferð á túrinum, boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, hvar gørnini standa við upplýsingum um knøttstøðu og dýpi á fyrra enda og seinna enda á hvørjum trossa sær. Verður trossi fluttur meira enn sjey fjórðingar á sama túri, skal boðast frá hesum.
*Stk. 2.* Tá túrur endar, og gørnini standa úti, skal boðast frá, hvar gørnini standa, og hvar ætlanin er at avreiða.

**§ 8.** Tá fiskifør við loyvi sambært hesi kunngerð fara inn at avreiða, og gørnini standa úti, skulu ikki ganga meiri enn 72 tímar, til skipið aftur er á fiskileið og fer at draga.
*Stk. 2.* Fiskiveiðieftirlitið kann í serligum førum veita undantak viðvíkjandi tíðarfreistini.

**§ 9.** Um fiskifar missir garn, hevur skiparin skyldu at gera sítt besta til at bjarga ella dreggja garnið, og at geva Fiskiveiðieftirlitinum fráboðan um staðfestingina, har garnið er mist. Skiparin hevur skyldu at boða Fiskiveiðieftirlitinum frá, um tað hevur eydnast at bjarga garninum.

**§ 10.** Brot móti ásetingunum í hesi kunngerð verður revsað eftir § 40, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

**§ 11**. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 62 frá 17. september 2004 um fiskiskap eftir havtasku og svartkalva við gørnum á føroysku landleiðunum.

Fiskimálaráðið, 4. mai 2010

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705